LM-084/2025

Óluva Nolsøe Djurhuus

Fra: Sosialráðgevarafelagið Føroya <srfelag@gmail.com>
Sendt: hósdagur, 11. desember 2025 21:55
Til: Jákup Andrias Kristiansen
Emne: Viðmerkingar
Vedhæftede filer: Viðmekingar til burturriknar ukrainar.docx

Hey
Viðheft eru viðmerkingar til lógaruppskot um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar.

Vinaliga
Sosialráðgevarafelag Føroya

Hallbjørg Lamhauge

Forkvinna

Viðmerkingar til uppskot um løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar

Takk fyri møguleikan at viðmerkja lógaruppskotið. Tað eru meira enn trý ár síðani fyrstu burturriknu ukrainarnir komu til Føroyar, og nógvar truplar støður hava verið síðani tá.

Burturriknu ukrainarnir hava tað til felags, at teir eru komnir til Føroyar undir somu umstøðum, men eru teir líka ymiskir sum fólk flest, og er hetta komið meira til sjóndar, jú longri teir hava búð í Føroyum.

Í løtuni búgva níggju fólk á Barnaheiminum. Av tí at bústaðarmarknaðurin í Føroyum er óstøðugur, er tað umráðandi, at bráðfeingisbústaðir altíð eru tøkir. Bráðfeingisbústaðurin kann verða teirra "trygdarnet" um tey standa uttan bústað. Hetta kemur av, at teir flestu av burturriknu ukrainunum búgva til leigu privat, og kann tað koma fyri, at teir missa bústaðin. Okkara royndir eru, at nakrir av teimum burturriknu ukrainunum longu hava flutt bústað seks ferðir innan trý ár. Hettar vísir seg við, at teir flestu av teimum hava eksil-stress, og tí er "Housing First" fyri burturriknu ukrainarnar so umráðandi.

Eksil-stress inniber m.a. óvissu um framtíð, stigmatisering, identitetskrisu, sosialt og fíggjarligt stress. Okkara royndir eru eisini, at tey eru meira útsett fyri sjúku, angist, tunglyndi, maktarloysi, PTSD, sukursjúku og øðrum autoimmunum sjúkum.

Gjøgnumgongd av lógaruppskotinum:

Viðmerking til §§ 1-9: Ongar viðmerkingar

V*iðmerking til § 10*: Um uppgávan hjá sosiala samskiparanum skal innibera at veita sosialfakliga ráðgeving, stuðul, hjálp, umframt at seta tey í samband við rættar myndugleikar og felagsskapir verður mett, *at tað er alneyðugt at samskiparin skal vera útbúgvin sosialráðgevi.*

Heildarsýnið, ið er yvirskipað amboð hjá sosialráðgevum, gevur sosialráðgevum serligan førleika til at síggja hvønn einstakan í eini størri heild, sum partur av teimum umstøðum ein livir í.

Hesar uppgávur verða longu frammanundan framdar av sosialráðgevunum, ið hava burturriknu ukrainarnar á Almannaverkinum um hendi.

Viðmerking § 11, nr. 3): Avleiðingarnar av at síggja burtur frá regluni um støðuna sum sambúgvandi kunnu verða, at burturriknu ukrainarnir fáa betri treytir enn bæði aðrir føroyingar og útlendingar, ið fáa fyribils uppihaldsveiting. Hetta kann skapa ein misjavna og mannamun.

Tað eru eisini burturriknir ukrainar, ið ikki hava rætt til fólkapensjón, umframt at teir heldur ikki hava rætt til familjuískoyti ella rætt til serligt barnaískoyti. Sum dømi kann nevnast, at eitt par í pensjónsaldri, har bæði fáa fyribils uppihaldsveiting sum sambúgvandi uttan børn og rinda kr. 8.000 í leigu, hava kr. 700 eftir um mánaðin at liva fyri til at rinda aðrar fastar útreiðslur sum til dømis telefonhald, tryggingar, sjónvarpsrásir, heilivág o.a.

Eitt bústaðarískoyti til teir burturriknu ukrainarnar, ið hava pensjónsaldur, hevði verið góður stuðul hjá teimum, so tey verða javnsett við føroyingar í pensjónsaldri.

Viðmerking til §§ 12-13: Ongar viðmerkingar.

Viðmerking til lógaruppskotið:

Sosialráðgevarafelag Føroya tekur undir við lógaruppskotinum, tí hetta kann geva Almannaverkinum betri sømdir at hjálpa teimum burturriknu ukrainunum og veita teimum meira virkna hjálp sum til dømis virknisvenjing og arbeiðsbúgving, soleiðis at teir blíva javnsettir við føroyingar.

Mett verður umráðandi, at samskiparin, ið settur verður hevur útbúgving sum sosialráðgevi. Hettar fyri at tryggja ukrainunum holla sosialfakliga ráðgeving innan almennalóggávuna, umframt í individuellum viðurskiftum og samfelagsviðurskiftum sum heild.

08-12-2025

Vegna Sosialráðgevarafelag Føroya

Hallbjørg Lamhauge, forkvinna

Bettina Christiansen, Iben Faaborg og Ingibjørg av Reyni Midjord